Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna
Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Útboð – Vestmanna kommuna**

Vestmanna kommuna skal við hesum biða um eitt tilboð upp á veiting av sápu og pappíri til øll starvsøkir og hølir hjá kommununi.

Stóru økini eru:

- Dagstovnur og frítíðarskúla. Talan er um tríggjar adressur. Tilsamans eru um 90 dagstovnabørn og eini 30 børn í 1-3 flokki afturat í frítíðarskúlanum. Starvsfólkahópurin er tilsamans umleið 36-40 starvsfólk

- Vestmanna skúla. Har eru um 30 starvsfólk og 163 næmingar í 1-9 flokki.

Harafturat er eisini:

- Ungdómshús
- Umsitingarhølir
- Maskinhøll v.m.
- Læknahølir
- Almenn vesi og havnaskrivstovuna

Niðanfyri eru vanligastu vørur, sum vit keypa, og ein meting av árligu nøgdunum:

| **Vørur** | **Nøgd** |
|---|---|
| Toiletrens 750ml | 72 |
| Vaskipulvur 2kg | 12 |
| Skurecreme 750ml | 56 |
| Skumsæbe/Hondsápa 6x1L | 18 |
| Grundrens 20L | 3 |
| Alrens/Universalrengøring 5L | 15 |
| Grovrens 5L | 12 |
| Hår- og kropsshampoo 1L | 12 |
| Håndklæderulle 190m - 6 pack | 86 |
| Håndklæderulle 350m - 6 pack | 6 |
| Toiletpapir - 42 ruller | 48 |

Vit eru ikki fastlæst á vørur ella ávís vørumerkir. Listin omanfyri er í mestan mun fyri at lýsa okkara tørv.

Umframt prís ynskir kommunan eisini at vita, hvørjar tænastur tit bjóða. Til dømis um vit sjálvi skulu bíleggja, ella um tit koma á staðið og fylla goymsluna, og um tit eisini bjóða dispensarar v. uppsetan.

Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna
Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

Tá støða skal takast til tilboðini, vigar prísurin 85% og tænastustøðið 15%.
Kommunan tilskilar sær tó eisini rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði.

Tilboðini skulu verða inni í seinasta lagi mánadagin 9. mars kl. 12.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at ringja til mín á tlf. 770102.

Vegna Vestmanna kommunu,

Sólvit Nolsø
kommunustjóri